## Bush ímóti Taiwan

Vanliga plagar amerikanska stjórnin at stuðla Taiwan í ósemju tess við Kina, men líkt er til, at taiwanska stýrið skal ikki vænta sær sama treytaleysa stuðulin úr Washington longur.

Í hvussu er boðaði George W. Bush, forseti, týsdagin frá, at viðurskiftini ímillum Kina og Taiwan eiga at standa við óbroytt. Orðini vóru ein beinleiðis áheitan á taiwansku stjórnina um at sleppa ætlanini at halda fólkaatkvøðu um at broyta viðurskiftini millum tey bæði londini. Taiwanska tjóðartingið samtykti fyri stuttum eina lóg, sum heimilar stjórnini at skipa fyri fólkaatkvøðum, og Chen Shui-bian, forseti, hevur roynt at sissa amerikanararnar við at siga, at tann ætlaða fólkaatkvøðan fær onga beinleiðis ávirkan. Men tað er eftir øllum at døma ikki nóg mikið fyri amerikanska forsetan.

– Vit eru ímóti øllum stigum, sum kunnu virka við til at broyta verandi viðurskifti, sama um tað eru teir kinesisku ella teir taiwansku myndugleikarnir, sum koma við teimum, segði Bush fyrradagin.

## Lítið at bora

Hóast norðmenn hava munandi færri oljuboripallar nú enn fyrr, hava teir, sum eftir eru, ov lítið at gera.

Tað er heldur ikki líkt til, at nøkur stórvegis broyting kemm enn á sinni. Á einari ráðstevnu fyrr í vikuni kom fram, at menn eru eitt sindur ósamdir um, hvussu gongdin í oljuleitingini verður, men teir flestu eru á einum máli um, at nógvir boripallar noyðast at liggja stillir tey næstu tvey ella trý árini. Orsøkin til tey døpru útlitini er, at menn ivast í, at oljuprísurin verður verandi so høgur sum nú, ogn at nógvur peningur fer til at leita eftir olju á djúpum vatni og í Russlandi.

Roknað verður við, at 16 pallar eru virknir í Norðsjónum, tá vit koma út í februar. Men tá pallarnir eru 41 í tali, koma nógv teir flestu at standa stillir, skrivar Aftenposten, sum ikki væntar nakra stórvegis broyting fyrr enn í 2006.

# Gløgg og jólamenn í gongugøtuni

**Leygardagin skipar Frítíðarklubbin fyri enn einum tiltaki í gongugøtuni. Hesaferð er talan um eitt rættiligt jólatiltak, har tú kanst keypa rúsfrítt gløgg, eplaskivur, brendar mandlur, piparnøtur, jólabrús og annað, ið hoyrir jólunum til**

JÓLAHUGNI
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*



*Leygardagin verður rættiligur jóladagur í gongugøtuni í miðbýnum í Havn. Tað er Fríðtíðarklubbin, ið skipar fyri tiltakinum*

Stóra jólatiltakið hjá Frítíðarklubbanum byrjar leygarmorgunin klokkan 11.00 í gongugøtuni í miðbýnum í Havn.

- Gløggið fara vit at hava standandi í eini stórari gassgrýtu á staðnum, og mandlurnar verða eisini brendar á grillum í sjálvari gøtuni, siga tey í Frítíðarklubbanum.

Um veðrið verður til vildar, fara Emma's Blues Band at spæla løg av nýggju fløguni, sum eisini verður at fáa til keyps í teltunum.

Eisini fer onkur at lesa eina fitta jólasøgu fyri bæði stórum og smáum, og jólamenn fara at geva børnunum karamellur.

Øll, ið hoyra til klubban fara at vera í reyðum blusum og nissuhúgvum.

- Hetta verður ein rættiligur jóladagur, og vit vóna at síggja so nógv sum gjørligt, siga fyriskipararnir.

Tórshavnar Kommuna hevur lænt Frítiðarklubbanum trý telt, og verða hesi prýdd við perum og øðrum jólaprýði.

Fyrr í heyst skipaði Frítíðarklubbin saman við Javna fyri einum tiltaki á gongugøtuni, í sambandi við at handlarnir í miðbýnum høvdu langan leygardag. Tiltakið eydnaðist so væl, at avgjørt var at skipa fyri einum líknandi tiltaki aftur á jólum.

Tey menningartarnaðu skipa fyri tí mesta av tiltakinum sjálvi. Tey eru ógvuliga stolt og fegin um, at tey megna at verða við til at skipa fyri tiltøkum, har so nógv fólk koma.

Ár teirra brekaðu er skjótt runnið. Nógv tiltøk hava verið á skránni hetta árið. Vónandi fara eins nógv tiltøk at verða í tí nýggja árinum, til gleði og gaman fyri okkum øll.

# Undirhald og grønakaka á Jinx

**Beint undan jólum skipar Gallarí Jinx fyri hugnaløtum fyri børnum. Yvirskotið av tiltakinum fer óskert til buss til búfólkið á Eirargarði 16A**

JÓLAHUGNI
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*



*Á Gallarí Jinx hava tey nakað, tey kallað, krónuinnsavning. Fyri høvnn seldan kopp av kaffi, fer ein króna til buss til búfólkið á Eirargarði 16A. 20. og 21 desembur, verður undirhald fyri børnum til frama fyri sama endamál*

Leygardagin 20. og sunnudagin 21. desembur verður undirhald fyri børn á Gallarí Jinx

Klokkan 17 leygardagin fer gandakallurin, Anton Framtonn, at undirhalda, og sunnudagin klokkan 17.00 fer Angela at siga søgur.

Børnini fáa grønakaku frá Frants og svali frá P/f Poul Michelsen.

Kostnaðurin fyri hvørt barnið er 30,00 krónur.

Tá Florentze læt upp Gallarí Jinx ætlaði hon, at kaffistovan skuldi verða meiri enn ein inntøkukelda. Tí gjørdi hon av, at ein partur av arbeiðnum á kaffistovuni skuldi verða vælgerandi.

Byrjað var við, at fyri hvønn seldan kopp av kaffi, fer ein króna til bussin til tey á Eirargarði 16A.

Krónuinnsavningin byrjaði fyrst í novembur, og ætlanin er, at gerast skal upp við ársenda, hvussu nógv er innkomið.

- Eydnast tiltakið væl, er einki til hindurs fyri, at innsavningin kann halda fram til einaferð í vár, sigur Florentze á Skipagøtu.

Viðskiftafólkini hjá Gallarí Jinx mekrja einki til innsavningina, tí hon er innroknað í vanliga prísin fyri ein kopp av kaffi.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Prógv sum heilsuhjálparar

**Hesar heimahjálpir eru uppskúlaðar til heilsuhjálparar á Heilsuskúlanum á Tvøroyri og fingu prógv í november 2003**



Standandi frá vinstru, aftara rað:

Nancy Splidt Jacobsen Argir, Svanhild Rasmussen Sandur, Malan Davidsen Sandur, Konny Olsen Søldarfjørður, Bergitta Hansen Miðvágur, Laila Joensen Vestmanna, Anna Maria Jespersen Froðba og Ingun Andreasen Hoyvík.

Standandi frá vinstru, fremra rað:

Hildur Johannesen Tórshavn, Birgerð Klein Hoyvík, Marjun Jensen Tórshavn, Elisabeth Joensen Toftir, Katrina Højgaard Søldarfjørður, Asta Andreasen Vágur, Jóna Skoralíð Leirvík og Anne-Thea Hammer Funningsfjørður.

## 40 ár síðan konfirmantiónina í Vestmanna Kirkju

**Leygardagin 25. oktober hittust tey sum vóru konfirmeraði í Vestmanna Kirkju 20. oktober 1963. Tey møttust í kirkjuni kl. 17.00 saman við Ingu Poulsen Dam, presti. Annars var tað Axel Tórgarð, prestur, sum konfirmeraði tey fyri 40 árum síðan. Seinni um kvøldið var døgurði í Losjuni og veitsla aftaná**



*Mynd: Jens Kr. Vang*

Aftasta rað f.v.: Frígerð Dam, f. Olsen, Vestmanna, Marita Christophersen, Vestmanna, býr í Havn, Tórhild Nielsen, f. Petersen, Vestmanna, Andrea Hansen, Oyrareingir, býr á Norðskála, Jóan Pauli Johannesen (Palli), Vestmanna, Sunleif Nielsen, Kvívík, Magnus Johannesen, Vestmanna, Petur Joensen, Vestmanna, Jógvan Durhuus (Agga), Vestmanna.

Miðraðið f.v.: Ebba Hansen, Kollafjørður, Katrin Isfeldt, f. Jacobsen, Leynar, býr í Havn, Hanna Sørensen, f. Hansen, Vestmanna, býr í Húsavík, Hervør Leonson, f. Müller, Mykines, býr í Sørvági, Oddbjørg Wethelund, f. Kristoffersen, Vestmanna, býr í Herlev í Danmark, Jona Jacobsen, f. Hansen, Vestmanna, John Haldansen, Vestmanna, Kristian Jensen, Kvívík, býr í Vestmanna, Ejfinnur Joensen, Vestmanna, Leivur Olsen, Vestmanna, Hans Toftum, Vestmanna.

Fremsta rað f.v.: Sigga Paula Christiansen, f. Olsen, Vestmanna, Malan Johannesen, Vestmanna, býr í Havn, Astrid Dahl-Olsen, Vestmanna, býr í Havn, Connie Dybczak, Vestmanna, býr í Havn, Bjørg Nielsen, f. Hellu, Vestmanna, Tórhall Egholm, Vestmanna, Marita Glerfoss, f. Madsen, Kvívík, býr í Havn, Grækaris Madsen, Kvívík.

Á myndini vanta: Frírun Dam Jacobsen, Vestmanna, Marja Gaard Jacobsen, Vestmanna, Sofía Joensen, Vestmanna, býr í Havn, Lena Hansen, Vestmanna, Tova Højgaard, Vestmanna, Marjun Follend, Vestmanna, býr á Strondum, Iva Olsen, Válur, býr í Havn, Arnbjørg Johansen, Signabø, býr í Danmark, Rólant Akraberg, Vestmanna, Leif Durhuus, Vestmanna, býr í Danmark, Jørgen Johannesen, Vestmanna, býr í Danmark, Jógvan Johannesen, Vestmanna, Símun Simonsen, Vestmanna.

Trý vanta á myndini, sum eru deyð: Duritha Jacobsen, Vestmanna, búði í Hvalba, Ásbjørg Jacobsen, Kvívík, og Jack Haldansen, Vestmanna.

Fyrireikarnir ynskja konfirmantunum eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár.

## Dagurin

**11. desember. Damasus,** deyður í 384. Diakonur hjá pávanum Liberiusi og varð sjálvur valdur til pávu eftir hann. Er fyrst og fremst kendur sum tann, ið álegði Hieronymusi at týða bíbliuna av nýggjum.